Prestafeðgarnir Rasmussen prædika tað góða orðið jóladag:

# Jesus solidariseraði seg við tey útstoyttu

JÓLAPRÆDIKA
*Jan Müller*

Báðir prestafeðgarnir. Petur Martin og Ólavur Rasmussen fara at prædika 1. jóladag. Petur Martin í Kollafirði og í Kvívík. Ólavur í Hvalba, Hovi og í einum prestagjaldi aftrat. Hvat fara teir at leggja dent á í jólaprædikum sínum:

Ólavur:

- Mínar jólaprædikur fara ikki at víkja nógv frá øðrum prædikum. Á jólum er tað Jesusbarnið. Og Jesusbarnið vaks upp undir ógvuliga vánaligum korum. Hann var leysingabarn. Hann var útstoyttur og hann solidariseraði seg við tey útstoyttu - og tey, sum bóru trúnna og hava borið hana víðari, eru tey útstoyttu, og tí skal eingin kenna seg útstoyttan.

Petur Martin:

- Tað verður nakað tað sama. Men har kemur kanska munurin millum tann eldra og tann yngra fram: hetta við at Gud verður menniskja. Hann er ikki tann fjarði Gud longur, síðani Jesus kom í heimin. Uppá ein ella annan máta at fáa tað fram, at hann kemur og er millum menniskju, hvussu tey enn eru vorðin og skikkað og sigur við tey eitt gott orð, sum tey kunnu taka við sær og ikki endiliga kenna seg sum beist.

Ólavur:

-Og har kundi man spunnið ein beinleiðis tráð til tá Jesus verður avrættaður. Hann verður avrættaður, tí hann passar ikki til í samfelagnum. Samfelagið gjørdi av við hann, men hann kundi ikki lata vera við entá á Krossinum at siga við røvaran, sum hekk víð síðuna av honum: at í dag skal tú vera við mær í Himmiríki. So radikalur var hann.



*Ólavur Rasmussen, sóknarprestur, her í Dómkirkjuni*

*Framhald av síðu 27*



*Ólavur Rasmusssen doypir abbadótrina, Óluvu í Dómkirkjuni.*

móti børnunum, at pota lógina niður í tey. Tá meinar hann við Gamla Testamentið og hesi harðrendu religiøsu áskoðanina at hótta við Helviti. Hann hevur sjálvur upplivað, hvussu vandamikið tað var fyri hann sjálvan. Og tað tók honum nógv harrans ár at berja seg burtur úr tí.

*- Sjálvt um vit meta okkum sum eitt siviliserað fólk í dag, hava vit so framvegis leivdir av hasum innan samkomur og kirkjur í Føroyum - at man skal kenna seg fordømdan og fortaptan, um man ikki livir upp til Bíbliuútleggingina hjá ávísum prædikumonnum ella trúðarbólkum?*

- Avgjørt. Tú kanst bara fara út á psykiatrisku deild. Tað eru mong, sum berjast við øllum hasum. Men tað er fatað í allari eyðmýkt. Tað er so skjótt sjálvur at blíva fordømandi. Men sjálvur haldi eg, at tað fer nógv andaligt misbrúk fram í Føroyum í dag.

*- Tosað verður so nógv um misbrúk í samfelagnum- kann man eisini tosa um misbrúk av Guds orði?*

- Avgjørt.

*- Hvussu kemur tað til sjóndar í føroyska samfelagnum í dag?*

- Onkursvegna kemur tað til sjóndar soleiðis, at prædikumenn leggja so øgiliga stóran dent á egoið. “Eg eri umvendur. Tú mást gera sum eg geri.” Tað er hetta egoiið, sum alla tíðina er so dominerandi. Eg kann ikki sum prædikantur krevja, at onnur fólk eru sum eg. Tíbetri. Men vit vita, at fólk eru ósamd um handa spurningin. Nógvir teologar hava sagt, og tað hava teir sjálvandi frá Jesusi: -Tað finst einki eg uttan at tað er eitt tú.

Petur Martin:

- Jødiski filosoffurin Martin Buber hevur skrivað eina lítla bók, sum eitur "Eg og tú". Og tað er heilt givið, at hon er undir ávirkan av kristindóminum.

### Kristindómur og politiskir flokkar

*- Vit hava flokkar í Vesturheiminum, sum kalla seg kristiligar. Hvat siga tit til tað?*

- Petur Martin:

- Man skal ikki prædika í tinginum. At tosa um kristiligan politikk haldi eg er ein óskykkur. Kunnu prædikumenn gera nakað gott samfelagsliga, so er tað at vera tann ringa samvitskan hjá politikarunum. Luther segði einaferð, at eitt samfelag kann ikki stýrast av evangeliinum, har skal ein lóg til. Tað er tað sama her. Tað er ikki evangeliið, sum skal stýra verðini, tí so endar alt í kaos. Og fara vit aftur til Paulus, so eru allar formaningarnar hjá honum til kristið fólk góð ráð og ikki ein nýggj lóg.

Ólavur:

- Tað er púra burtur við at hava flokkar, sum kalla seg kristnar. Men tað er kanska tí, at vit eru so ósamd um handa spurningin, og tað ger einki. Tað gerst ikki við.

Petur Martin:

- At vera ósamd um eitt og annað er sunt og náttúrligt, tí so fær man diskuterað tað.

*- Tey, sum eru í kristnum flokkum halda hetta at vera rætt og skilagott!*

Ólavur:

- Jú, men tað er so øgiliga skjótt har frá og so at siga, at Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin ella Fólkaflokkurin bestanda av ókristnum menniskjum. Onkursvegna liggur tað og lúrir undir fláunum.

*- At taka Guds orð fram í tingrøðum er væl ikki skeivt?*

Petur Martin:

- Man kann jú brúka sitat til alt møguligt, men at útnevna sín egna politikk, sum tann einasta kristiliga politikkin, tað er tvætl.

Ólavur:

- Nú skal man vera varin við at gera seg klókan uppá, hvat onnur fólk hugsa, men eg havi ein varhuga av, at nógv av teimum, ið eru virkin í kristiligu flokkunum, vilja t.d. vera øgiliga skjót til at fordøma tað, sum hendur í islamisku rørsluni, tá ið politikkur og islam verða blandað saman. Tá sær man tað so væl, tí tað er í útlondum, men kanska ikki so væl, sum tá tað er í Føroyum. Men fyribrigdið er júst tað sama í míni verð.



# Rættiligt sildarok á Skálafjørðinum

*Joen Jakku saman við soni og abbasoni hendan fongríka dagin.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*






*Útróðrarmaðurin, Páll Højgaard á Toftum, keypti nakað av sild hendan dagin til hummaraagn. Her verður hivað upp úr nótini og í bilin hjá Páll.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Tað er ikki bara í Singapore, at tað er sildarok; tað er tað so sanniliga eisini á Skálafjørðinum.**

**Royndist dagurin í gjár hjá sjeytiára gamla, Joen Jacob Johannesen við deksbátinum, Katrin, hava teir fiskað 100 tons av sild í eina viku!**

SILDAROK
*Vilmund Jacobsen*

Tað var ein forvitnislig sjón, sum møtti okkum í Oyrahavnini á Toftum seinnapartin hósdagin. Innanfyri sjálvan pierendan lá lítli deksbáturin, Katrin úr Søldarfirði, søkklaðin av sild. Men tað, sum báturin hevði innanborða, var ikki allur fongurin hendan dagin. Nótin hekk framvegis úti í stýriborðsíðu, og í henni vóru eisini fleiri tons av livandi sild, sum báturin ikki kundi bera.

Sjeytiáragamli bátaeigarin, Joen Jacob Johannesen úr Søldarfirði, sonur hansara, Jan og abbasonurin, Hanus, mannaðu deksbátin hendan dagin. Teir vóru farnir avstað um 10.30-tíðina og høvdu kastað nótina nakað vestanfyri Oyrahavnina, har teir høvdu sæð nógva sild á loddinum. Umleið kl. 15.00 seinnapartin vóru teir aftur at landi við 24-25 tonsum!

Lastin á Katrin tekur eini 8 tons av sild, og umleið sama nøgd kann vera á dekkinum, men tá er báturin eisini søkklaðin. Hetta letur seg bara gera í allarbesta veðri, tá ið stutt er at sigla. Hósdagin vóru teir bara nakrar áralongdir úr landi, tá ið báturin var fullur, og klárt var at "sleipa" nótina til lands við tí, ið eftir var.



*Báturin er søkklaðin og í nótini, sum flýtur við bátssíðuna, eru eini 13-14 tons av sild.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### 70-80 tons

Bátaeigarin, Joen Jacob, sigur, at tað eydnaðist teimum hósdagin at sleipa nótina við umleið 13-14 tonsum av sild, inn í Oyrahavnina á Toftum.

– Hetta er eitt ógvuliga tungt sleip hjá einum so lítlum báti, og nógv stendur á, men tá ið vit komu inn ímóti, stóðu menn á bryggjuni og hjálptu okkum at.

Í slíkum føri er vandi fyri, at nótin tekur í botn og skrædnar.

Hann metir, at samlaða veiðan hósdagin var eini 24-25 tons, og tað er ein stórur fongur hjá einum so lítlum deksbáti.

Túrurin inn í Oyrahavnina gjørdist stuttur, tí teir fingu sildina stutt vestur úr landinum, og lotið lá uppá land.

– So, vit noyddust at hava varpið úti fyri ikki at koma ov nær landi, meðan vit fyltu úr nótini og uppí bátin, sigur Joen Jacob.

Hann sigur, at hetta hevur verið ein ófør vika til sild - tann besta hjá honum nakrantíð.

– Vit hava roynt allar dagarnar í hesi vikuni, mánadagin, týsdagin, mikudagin og í dag, og samlaða veiðan liggur millum 70 og 80 tons.

Tá ið Sosialurin tosaði við Joen Jacob seint hóskvøldið, var ætlanin hjá tí sjeytiára gamla at fara avstað aftur fríggjamorgunin, um viðraði.

Vit vístu á, at um fríggjadagurin verður líka fongríkur sum hósdagurin, kemur veiðan hjá deksbátinum, Katrin, hesa vikuna uppá heili 100 tons av sild!

– Tað er ilt at siga, hvussu verður í morgin. Dagarnir eru misjavnir, men í dag var nógv sild at síggja har úti á fjørðinum, sigur hann.

Joen Jacob hevur roynt eftir sild í mong, mong Harrans ár, bæði við gørnum og við nót. Hann rigg-

*Framhald á síðu 52*